# Posta Stamps

Føroyar

No. 48

Apríl 2021



- Cz. Slania 100 ár
- ILA / Covid-19 í Føroyum
- Ingálvur av Reyni
- Kirkjuklæði III: Biskupskápur

Posta
FAROE ISLANDS




Royndarprent




# Cz. Slania 100 ár

Tann 22. oktobur 2021, eru 100 ár liðin síðan meistaragravørurin Czeslaw Slania (1921-2005) varð føddur í lítla býnum Czedladz í Pólandi. Slania telist millum heimsins virknastu og dugnaligastu gravørar. Hann graveraði yvir 1.000 frímerki fyri 32 ymisk lond kring knøttin og var kendur fyri skjót- og neyvleika. Hann graveraði eisini annað enn frímerki, m.a. pengaseðlar – og varð útnevndur kongaligur hovgravørur í Svøríki, Danmark og Monaco. Hann fekk fleiri heiðurstekin og heiðursheiti fyri sítt arbeiði.

Longu sum barn hevði Slania framúr gávur at tekna nágreiniligar smámyndir, serliga andlitsmyndir og hestar. Hann teknaði ofta skúlafelagar sínar og avritaði pengaseðlar og frímerki. Søgurnar siga, at hann eisini avritaði atgongumerki til biografsýningar og til nevaleikadystir. Tað er tó óvist, um hann nakrantíð nýtti atgongumerkini. Eftir hvat sigst, komu sjáldsomu gávurnar hjá Slania til sín rætt undir seinna heimsbardaga, tá hann gjørdi følsk samleikakort fyri pólsku mótstøðurørsluna.

Eftir krígslok, í 1945, slapp Slania inn á grafisku breytina á listaháskúlanum í Krakow, har hann sum fráleið, fekk serkunnleika í gravørkynstrinum, etju á koparplátu og koparstungu.

Longu áðrenn lokna útbúgving, varð Slania settur í starv á frímerkjaprentsmiðjuni hjá pólska postverkinum – og starvaðist har í 6 ár.

Í 1956 flutti Slania til Svøríkis. Fyrstu tíðina hevði hann ilt við at finna fakligt arbeiði, men eftir tveimum árum, fekk hann starv hjá svenska postverkinum, har hann næstu 40 árini graveraði frímerki í hópatali – sum frá leið eisini fyri onnur lond.

Í 1962 graveraði Czeslaw Slania fyrsta frímerkið fyri danska postverkið. Eftir tað



*Martin Mörck í ferð við at gravera frímerkið av Slania. Mynd: Lennart Nilsson.*

komu 241 donsk frímerki frá hansara hond. Hann graveraði eisini 80 frímerki fyri Grønland. Fyri Føroyar graveraði og sniðgav hann 100 frímerki.

Føroysku frímerkini hann graveraði, sýna margfeldið hjá Slania. Landsløg, bygningar, træskurðir – plantur, djór og fólk í ymsum umstøðum. Serliga andlitsmyndirnar av føroyskum rithøvundum og fólkalívsmyndirnar skara fram úr.

Hann gjørdi eisini tvey frímerkjaørk. Fyrra til 25 ára dagin hjá Postverki Føroya. Seinna var av einum málningi hjá danska málaranum, Emil Kruse, har myndevnið var ein dansiringur. Hetta frímerkið var nummar 100 í røðini av føroyskum Slania frímerkjum – og tað seinasta hann gjørdi fyri Posta.

Meistaraverkið fram um onnur av føroysku Slania frímerkjunum, er uttan iva hitt kenda veðrafrímerkið. Ein nágreinilig andlitsmynd av einum fullvaksnum veðri við vælvaksnum hornum, ið sær út til at vilja leypa úr frímerkjarammuni nær sum helst. Søgan sigur, at Slania í roynd og veru var í holt við eina aðra gravøruppgávu, men var so hugtikin av vakra veðrinum, at hann alsamt gekk aftur á hann.

Nú hundrað ár eru liðin síðan Czeslaw Slania varð føddur, geva Danmark, Grønland og Føroyar út hvør sítt smáark, øll við sama frímerki, har myndevnið er ein andlitsmynd av Slania. Ørkini hava tó ymsar bakgrundir, sermerktar fyri einstaka landið. Á føroyska arkinum er útsýni yvir Klaksvík graverað við Kunoyargalvi trúnandi í baksýni. Frímerkið og ørkini eru graverað av kenda gravørinum Martin Mörck, sum mong meta sum arvtakara eftir Slania.

*Anker Eli Petersen*

# Føroysk frímerki eftir Slania

1975







1976




1978




1979




1980



1981




1983




1984




1985



1986




1987




1988



1989










1995




1997




2000




2001




2003





Royndarprent




# ILA / COVID-19 í Føroyum

Í ferðafrásøgnini um ferðina til Føroya við stuttleikabátinum "Maria" í 1854, siga Samuel Rathbone og E. H. Greig frá, tá teir komu leiðina fram. Teir sigldu tætt framvið Nólsoynni við signalflaggi at teimum tørvaði loðs. Eitt tólvmannafar varð flotað og róði varisliga út móti seglskipinum. Tað fyrsta nólsoyingar spurdu, tá teir vóru so nær, at mannamál hoyrdist, var: "Er nakar sjúkur umborð?" Ikki fyrr enn skipsmanningin hevði gjørt greitt, at teir ikki høvdu sjúku við sær, legði báturin at. Tveir mans komu umborð og loðsaðu Mariu inn á redina.

Og tað var ikki ógrundað ræðsla, ið gjørdi, at nólsoyingar vóru varnir at leggja at einum fremmandum skipi. Í øldir, líka síðan svartadeyða í 14. øld, var fólkið í Føroyum serliga viðkvæmt fyri smittu, tá pest, pokur ella aðrar umfarssjúkur komu til oyggjarnar við skipum uttan úr heimi.

Bara nøkur ár frammanundan at "Maria" vitjaði oyggjarnar, í 1846, herjaði ein herviling meslingafarsótt í Føroyum. Næstan ongin var órinin fyri sjúkuni, so av teimum 7782 føroyingunum tá á døgum, vórðu uml. 6000 fólk smittað – og uml. 150 doyðu av sjúkuni.

Eisini herviliga krímsjúkan, vanliga rópt "Spanska sjúka," sum árini 1918-1920 herjaði heimin, kom til Føroya. Yvir 1100 fólk gjørdust sjúk og 13 doyðu. Samanumtikið verður mett, at spanska sjúka kravdi uml. 50 milliónir mannalív um allan heim. Frá tíðini fyri fyrra aldarmótið og væl upp í 20. øld, vóru Føroyar hart raktar av tuberklasjúkuni. Miðskeiðis í tríatiárunum byrjaðu umfatandi kanningar av fólkinum og seinni kravdist tvungin tuberklakanning fyri at kunna mynstra umborð á fiskiskip. Hetta, saman við tvungnari koppseting frá 1946 – og tá heilivágur, ið kundi grøða tb-sjúklingar endiliga kom í 1950, førdi tað til at tuberklarnir vórðu týndir sum fólkasjúka.

**Covid-19 kyknar**

Í desembur 2019 fræddist, at eitt nýtt og sera smittandi frábrigdi av tí illgitna Korona-



*Farið varð kring oyggjarnar at gera Covid-19 kanningar í august 2020 - her í Dímun. Mynd: Fróði Jacobsen.*

virussinum varð staðfest í Wuhan í Kina. Nýggja virussið við formliga heitinum, SARS-CoV-2, førdi til smittusjúkuna Covid-19, ein krímsjúka, ið kann elva til lungnabruna – og, serliga hjá fólki við veikari immunverju, seta seg í niðaru andaleiðirnar og verða atvold til at sjúklingurin doyr.

**Ávaringarklokkurnar ringja**

Covid-19 ferðaðist skjótt í kring og varð longu í januar 2020 staðfest í fleiri londum í fjareystri og í USA. Tann 30. januar lýsti alheimsheilsufelagskapurin WHO Covid-19 sum eina alheims heilsukreppu. Í februar fanst sjúkan í 28 londum, har av fleiri í Evropa – og tað var nú greitt, at heimurin stóð fyri einari veruligari alheimsfarsótt.

Har fóru mangar ávaringarklokkur upp at ringja í teimum døgum – eisini í Føroyum. Føroyska heilsuverkið byrjaði í januar at fyrireika seg til, hvussu berast skuldi at, um sjúkan skuldi komið til Føroya. Og ein av teimum, ið hoyrdi ávaringarklokkurnar greiðast, var Dr. Debes H. Christiansen, leiðari av patologisku deildini á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Tað gjørdist skjótt greitt fyri serfrøðina, at fremsti framferðarháttur í stríðnum móti Covid-19, var at kanna fólk, avbyrgja tey smittaðu og finna fram til smittukeldurnar. Um man ikki megnaði at steðga smittuni, har hon tók seg upp, var vandi fyri at sjúkrahúsverkið varð ovbyrjað og hoknaði undir byrðuni.

Debes Christiansen fór longu í januar 2020 at gjøllkanna hvussu koronuvirussið var sett saman – og kom við einari sera ótraditionellari loysn, hvussu fólk í stórum tali kundu kannast fyri smittu.

**Frá laksi til fólk**

Í 2001 stóð føroyska laksaalingin fyri hóttafalli. Laksurin í flestu alistøðunum varð rak-

tur av fiskasjúkuvirussinum ILA. Eftir óvanliga stuttari tíð, mistu alarar uml. 90% av alilaksinum og alivinnan fór av knóranum.

Ein avleiðing av ovurstóra missinum í einum tí mest týðandi føroyska útflutninginsøkinum, var at myndugleikarnir gjørdu av, at alilaksurin javnan skuldi kannast fyri virus – og Heilsufrøðiliga Starvsstovan keypti útgerð og bygdi eitt framkomið laboratorium til gjøllkanningar av teimum mongu royndunum frá alistøðunum.

Tá svínakrím hótti í 2009, hevði Debes Christiansen kannað um reiðskapurin og framferðarhættir til laksakanningarnar, kundu stillast inn til at kanna fólk. Tað vísti seg at bera til – og eisini lagast til Covid-19 kanningar.

Debes Christiansen tosaði við Dr. Shahin Gaini, serlækna í smittusjúkum á Landssjúkrahúsinum – og serfrøðin avgjørdi, at satsa upp á kanningarorkuna hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Kanningarstovan varð útbygd, og seint í februar varð fyrsti føroyingurin kannaður við nýggju kanningini.

**Framferðarháttur**

Við nýggja kanningarháttinum kundu heilsumyndugleikarnir nú miða eftir at steðga smittubreiðslu. Tiltøk vórðu sett í verk at kanna øll ferðandi, ið komu til Føroya við flogfari ella skipi. Nú bar eisini til at fremja hópkanningar, tá Covid-19 loksins varð staðfest í Føroyum. Meðan umheimurin enn stríddist við at fáa kanningarorku og hættir at virka, høvdu føroyingar longu eitt munadygt og munandi bíligari kanningarvirksemi koyrandi. Áhaldandi kanningar, sporing av smittukeldum, avbyrging av smittaðum fólki, 6 daga sóttarhald fyri øll ið komu uttan úr heimi – umframt avmarkað tal av fólki, ið savnast, gjørdist høvuðsframferðarháttur í stríðnum mótvegis Covid-19 í Føroyum. Harumframt vanligu ráðini um reinføri, frástøðu og munnbind í almennu samferðsluni.

Tað var ikki óvæntað, tá Debes H. Christiansen, væl uppiborið, varð skýrdur ársins føroyingur í 2020.

**Fyrsta bylgja**

Tann 4. mars 2020, varð illa gitna virussmittan staðfest í Føroyum á fyrsta sinni. Fyrstu dagarnar øktist talið av smittaðum í stórum og var upp á tað hægsta tann 23. mars, tá 102 fólk vóru sjúk av covid-19. Hetta var fyrsta bylgjan, sum varð bard niður aftur við umfatandi kanningum, smittusporing og sóttarhaldi av smittaðum og avvarðandi. Tann 11. mai 2020, var ongin tilburður eftir í landinum.

**Onnur bylgjan**

Frá 11. mai helt góða støðan sær til seinast í juli. Stutt fyri ólavsøku varð smittan aftur staðfest, og komandi dagarnar kom ein ógvuslig øking í talinum av smittaðum. Tann 15. august var talið upp á tað hægsta við 147 smittaðum. Enn einaferð eydnaðist at berja smittuna niður við umfatandi kanningum, sporing av smittukeldum og sóttarhaldi fyri sjúk og avvarðandi – og síðst í august kom talið niður aftur á null.

**Ein minni triðja bylgja**

Tíðin eftir næstu bylgju, gjørdist tó ikki heilt so friðarlig sum eftir fyrstu. Frá ongum tilburðum síðst í august, øktist smittutalið aftur í septembur og kom upp á 43 sjúkratilburðir tann 1. oktobur – tá tað aftur fall til 3 – 5 sjúk í byrjanini av desembur. Her skal




*Tann 30. desembur 2020 bleiv Gunnrið Joensen, sjúkrarøktarfrøðingur, sum fyrsta fólk í Føroyum koppsett fyri COVID-19. Mynd: Bjarni Árting Rubeksen.*

tó viðmerkjast, at partur av teimum staðfestu Covid-19 tilburðunum í Føroyum, stavar frá fremmandum fiskiskipum, ið søktu havn við sjúku umborð.

**Fjórða bylgja**

Í desembur óttaðust fólk aftur fyri einari ógvusligari øking av sjúkratilburðum, við tað at útisetar og lesandi vanliga koma heim at halda jól. Smittukurvan vaks eisini um miðjan desembur, men kom ongantíð upp á sama støði sum í mars og august. Royndirnar frá ólavsøku høvdu helst skelkað fólk og gjørt tey meira varin. Bylgjan kom í hæddina um nýggjársleitið við 66 tilburðum av Covid-19 – og fall so aftur til miðjan januar 2021, fyri síðan spakuliga at minka burtur í onki.

Í skrivandi løtu er ongin tilburður av Covid-19 í Føroyum.

Higartil (tann 30.03.2021), hava verið 661 tilburðir av Covid-19 í Føroyum, harav eru 660 fólk staðfest frísk aftur. 241.082 kanningar eru gjørdar av teimum 52.920 íbúgvunum í landinum – hægsta kanningartal í heiminum í mun til fólkatalið.

Hvat fer at henda framyvir, er av góðum grundum ógreitt. Heilsuverkið er farið undir at koppseta allar føroyingar. Tann 28. mars 2021 høvdu 5.853 fólk fingið fyrsta prikið (11% av fólkinum) – meðan 4.106 hava fingið bæði prikini (7,7% av fólkinum).

*Anker Eli Petersen*







Royndarprent

# Ingálvur av Reyni - gjøgnum tíð og rúmdir

Tann 18. desembur 2020, vóru hundrað ár síðani listamaðurin, Ingálvur av Reyni (1920-2005), var føddur í Havn. Vit nýta høvi at hyggja aftur á eitt listarligt megnaravrik, ið flutti føroyska myndlist og okkum øll fram á leið.

Listarliga ávirkanin og týdningurin hjá Ingálvi av Reyni fyri føroyska list kann ikki yvirmetast. Árinið er stórt, og tað er bæði av grundleggjandi og kollveltandi slag. Fyrst og fremst snýr tað seg um eitt langt listafólkalív, livað her á landi - hendan ikki serliga einfalda avbjóðingin at fáa tað at bera til at liva í Føroyum sum yrkislistafólk við familju og øllum vanligum útreiðslum. Umframt henda grundleggjandi leiklutin, hevur Ingálvur av Reyni ein ikki minni týdningarmiklan leiklut í okkara listasøgu sum antagonistur og uppreistrarmaður og sum tann listamaðurin, ið av álvara sjósetti ta nonfigurativu og abstraktu myndlistina í Føroyum.

**Litríkir sannleikar**

Ingálvur av Reyni hevur málað ótrúliga nógvar góðar málningar, og tað gjørdi hann, tá hann arbeiddi út frá reglunum hjá læraranum Aksel Jørgensen um at brúka bjartastu mótsetningslitir, men eisini tá hann seinni hitti Jack Kampmann og fylgdu ráðum hansara um at tálma litirnar yvir í grátt og myrkt. Tær gráu myndirnar eru framúr góðar og tær svørtu – bæði smáar og monumentalar, og tað sama kann sigast um stórfingnu málningarnir seinastu árini fyri ikki at tosa um tekningar og akvarellir.

**Tinganes**

Ein verulig perla er figurativi og friðsæli oljumálningurin Tinganes frá 1947. Í litum er lítla myndin skipað út frá meginregluni um mótsetningslitir, sum lærarin hjá Ingálvi av Reyni, Aksel Jørgensen, lærdi sínar næmingar á akademinum, og sum tað sambært Ingálvi tók nógv ár at frígera seg frá. Hann helt seg vera ov lítið sjálvstøðugan árini eftir akademiútbúgvingina, men henda myndin frá formativu árunum er sera væl eydnað. Ingálvur av Reyni megnar at brúka mótsetningslitirnar við skili, tí hann sum málari er ein framúrskarandi koloristur. Bláviolette heildartónin í myndini fær hita og glóð av teimum sterku, komplementeru appilsingulu litflatunum, meðan teir grønu



*Ingálvur av Reyni, 1971. Mynd: Jostein Skeidsvoll.*

litfarrarnir fáa klingandi mótsvar frá vínreyðum og rustreyðum litflatum. Sjálvt um talan er um eina figurativa mynd, er hetta eisini rættiliga abstraherað flatumálarí, sum peikar fram móti tí, ið koma skal.

**Gjøgnum tíð og rúmdir**

Hesin málningurin er stórfingin í øllum orðsins týdningum. Tá Ingálvur av Reyni var 82 ára gamal, fekk hann heiðursuppgávuna at mála eitt stórt verk til løgtingssalin, ið skuldi hanga á endavegginum aftan fyri formannin og røðarapallin. Heitið á henni er Gjøgnum tíð og rúmdir, sum er ein yrking hjá Janusi Djurhuus. Eitt brot úr yrkingini ljóðar: *"Djúpt í mínum huga/ har alfjarar øldir húsast/ djúpt í mínum huga/ har forfedra fjøldir durva/ drálar ein sangur…/ Í honum hoyrist látur frá leskandi keldum…/ í honum andar fleyrið hitt lina og lotið hitt lýggja/ í honum dunar øðiligt brim og skakandi stormar…"*. Um vit flyta innihaldið av yrkingini hjá Janusi Djurhuus yvir á myndlistaverkið, kann málningurin møguliga fatast sum ein hásongur til Føroyar, Føroya søgu, fólk, náttúru og veðurlag. Litavalið er savnað í gráum við svørtum linjum, men við hópin av somu lýsandi litum, sum Ingálvur av Reyni brúkti á ungum árum, har knallreytt og pink finna sína javnvág í ymsum grønum mótsetningstónum, har appilsingul strok festa í bláar litflatar og violettu litirnir fara upp at skelva av einum farra av sólgulum. Kompositiónin er liggjandi eins og eitt landslag í kringsýni, men myndin er ógvuliga abstrakt, ekspressiv og dynamisk við rútmiskum endurtøkum av mótgangandi rørslum á skák. – Hygg eina løtu at myndini og ber saman við ta lítlu myndina Tinganes. Tó at 55 ár, hópin av royndum og kvadratmetrum eru á muni millum listaverkini bæði, ta figurativa og friðsæla og tað abstrakta og rokmikla, so er frástøðan ikki eins stór og mann skuldi trúð - tað er ein og sami listamaður, sum skapti bæði.

*Kinna Poulsen,*
*Cand. mag. í listasøgu og listaummælari*



Royndarprent




# Kirkjuklæði III: Biskupskápur

Kirkjuklæðini hjá presti og biskupi fylgja teimum liturgisku litunum í kirkjuárinum og knýta seg eisini at kirkjuligu hátíðunum og halgidøgunum.

Í hesari triðju og seinastu útgávuni um føroysk kirkjuklæðir eru vit nú komin til biskupskápurnar. Tær undanfarnu útgávurnar hava víst messuaklar í reyðum, grønum, viólbláum og hvítum liti.

Biskupskápuna brúkar biskupur til øll serlig høvi, t.d. til prestavígslur, tá ið kirkjur fylla, á ólavsøku, til hátíðardagar í kirkjuni, og tá ið biskupur tekur lut í kirkjuligum hátíðarhaldi uttanlands. Føroya biskupur hevur tríggjar biskupskápur í ymsum litum at velja ímillum, eina hvíta, eina grøna og eina gylta.

Tann hvíta varð tikin í nýtslu í 1963, tann grøna varð tikin í nýtslu í 1989, og tann gylta varð tikin í nýtslu í 2013.

Posta hevur valt at vísa ta hvítu og ta gyltu biskupskápuna á hesum báðum frímerkjunum.

**Hvíta biskupskápan**

Dansk Paramenthandel seymaði ta hvítu biskupskápuna í 1963. Klæðið til kápuna hevur myndahøggarin Edvard Jensen teknað. Klæðið er handvovið í Italia og gjørt úr hvítum silki- og gulltráði.

Biskupskápan er aftan prýdd við einum krossi. Luthersrósan er mitt í krossinum. Framman er ein bordi allan vegin. Paillettir og plantan, jerikorósan, eru broderaðar á bordan framman.

Jerikorósan er ein turr og brún oyðimarkarplanta, sum kann klára seg í fleiri ár uttan vatn. Men so skjótt sum hon fær bara eitt lítið sindur av vætu, so sprettir hon í vøkrum grønum litum.



*Jógvan Fríðriksson, biskupur, í gyltu biskupskápuni. Mynd: Fotostudio.*

**Gylta biskupskápan**

Hetta er tann nýggjasta biskupskápan, og hon varð tikin í nýtslu á ólavsøku 2013.

Biskupskápan er gylt, sum súmbolskt merkir: tað æviga ljósið, guds dýrd og kraft. Tað súmbolska er krossurin, ringurin, Føroyar og sóljan. Teknað hevur Jógvan Sámal Heldarsskarð úr Klaksvík. Gjørt prikkimynstur og áteknað hevur Gisley Dahl Bonde úr Tórshavn. Broderað hevur Paulina M. K. Eliasen av Syðradali. Seymað hevur Ruth Laksáfoss úr Klaksvík. Teknað spennið hevur Marni Laksáfoss úr Klaksvík. Klæðið er keypt úr Onglandi.

**Klæði og litir**

Hugsa vit um kirkjuklæði, so er prestakjólin best kendur fyri sín svarta lit. Hinvegin hevur prestakjólin eina ávísa tign og í okkara siðvenju ímyndar prestakjólin lívsins álvarsemi - bæði góðar og tyngri løtur. Men kirkjan er rík í sínum liturgisku litum. Ikki einans svørt og hvít. Her eru aðrir lívsjáttandi litir, sum alt eftir kirkjuárinum og sjálvari løtuni í kirkjuni siga sína søgu og vísa hugalagið, t.d. gleði ella sorg, vón um gróður ella angur um stigin spor. Liturin sigur frá huglagnum. Liturin tulkar tekstin og fær okkum at hugsa. Ikki einans orðini eru kveikjandi. Liturin, ljóðið, samveran og tónin. Hetta tilsamans er ein samljóðandi heild, sum vit kalla gudstænastu. Messuaklar, stola, altardúkar, veggjateppi og annað tílíkt handarbeiði, siga eisini søguna um virknar hendur, sum við nærlagni, hegni og kærleika geva kirkjuni eina virðiliga útsjónd. Hesi klæði klæða føroysku fólkakirkjuna og lata hana í fínasta skrúð.

Við hesum tilsamans seks frímerkjunum eru vit nú komin á mál við røðini um kirkjuklæði í føroysku fólkakirkjuni.

*Kelda: Bókin "Kirkjuklæði", 2021, eftir Paulinu M. K. Eliasen*

# Nýggjar útgávur 12. august, 20. september og 1. oktober 2021



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Cz. Slania 100 ár - felagsútgáva við Danmark og Grønland** |
| Útgávudagur: | 12.08.2021 |
| Virði: | 39,00 kr |
| Nummar: | FO 964 |
| Stødd, frímerki: | 50 x 35 mm |
| Stødd, smáark: | 110 x 70 mm |
| Mynd, Slania: | Wayne Chen |
| Snið / gravura: | Martin Mörck |
| Prentingarháttur: | Stálprent/Offset |
| Prentsmiðja: | La Poste, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Brævpakkar í Føroyum, 0-100 g |
| Aðrar vørur: | Svartprent og felagsmappa við DK og GL |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **ILA virus / COVID-19 í Føroyum** |
| Útgávudagur: | 20.09.2021 |
| Virði: | 20,00 og 25,00 kr. |
| Nummar: | FO 965-966 |
| Stødd, frímerki: | 37 x 48 mm |
| Stødd, smáark: | 84 x 62 mm |
| Listafólk: | Edward Fuglø |
| Prentingarháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Bpost, Belgia |
| Postgjaldsbólkur: | Brøv til útheimin, 101-250 gr. |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **List: Ingálvur av Reyni** |
| Útgávudagur: | 20.09.2021 |
| Virði: | 17,00 og 39,00 kr. |
| Nummar: | FO 967-968 |
| Stødd, frímerki: | 39,64 x 26 mm and 50,57 x 26 mm |
| Listafólk: | Ingálvur av Reyni |
| Prentingarháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja brøv og brævpakkar, 0-100 gr. |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Kirkjuklæði III: Biskupskápur** |
| Útgávudagur: | 20.09.2021 |
| Virði: | 17,00 og 27,00 kr. |
| Nummar: | FO 969 - 970 |
| Stødd, frímerki: | 30 x 40 mm |
| Prentingarháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Brøv innanoyggja og til útheimin, 0-100 gr. |
| Aðrar vørur: | Eitt sjálvklistrandi hefti við 6 frímerkjum |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Postgjaldsmerki 2021: Søgusigarar** |
| Útgávudagur: | 01.10.2021 |
| Virði: | 4 x 17,00 kr |
| Stødd: | 55,0 x 22,5 mm |
| Listafólk: | Bárður Dal Christiansen |
| Prentingarháttur: | Flexoprent |
| Prentsmiðja: | Limo Labels, Danmark |

Snið og uppsetan: Posta Stamps. Framsíðumynd: Koronakanningar á Tróllanesi. Myndatøka: Fróði Jacobsen. Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo

ISSN 1603-0036

/faroestamps

# Nýtt

## Plakat: Andrea Árting




Posta hevur framleitt eina snøgga plakat í sambandi við frímerkjaútgávuna av undangongukvinnuni Andreu Árting. Plakatin er prentað á góðskupappír og er 420 x 297 mm (A3) til støddar.

Prísur: 150,00 DKK

## Felagsmappa: Cz. Slania 100 ár




Snøgg mappa, sum verður givin út í sambandi við felagsútgávuna av Cz. Slania, 12. august 2021.

Í mappuni eru tey trý smáørkini frá ávikavist Føroyum, Danmark og Grønlandi, som øll eru graverað av Martin Mörck. Harafturat er føroyska svartprentið eisini við í mappuni.

Prísur: 225,00 DKK.

## Postgjaldsmerki 2021: Søgusigarar




Heðin Brú: Feðgar á ferð




Dr. Jakob Jakobsen: Sagnir og ævintýr




Jørgen-Frantz Jacobsen: Barbara




William Heinesen: Móðir sjeystjørna

Posta FAROE ISLANDS

# Bíleggingarlepi - Posta Stamps nr. 48

| Nr. | Vøra | | Prísur DKK | Prísur Euro | Nøgd | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Útgáva 12.08.2021 - Cz. Slania 100 ár - FO 964 (smáark við 1 frímerki)** | | | | | | |
| PPS000821 | Cz. Slania 100 ár, smáark óst. ár | * | 39,00 | 5,50 | | |
| FFT000821 | Cz. Slania 100 ár, smáark st. | ☉ | 39,00 | 5,50 | | |
| DDT000821 | Cz. Slania 100 ár, smáark dgst. | ☉ | 39,00 | 5,50 | | |
| FFU000821 | Fyrstadagsbjálvi v/smáarki | ☉ | 44,00 | 6,15 | | |
| WBPSLANIA | Cz. Slania, svartprent | * | 150,00 | 21,00 | | |
| WSLANIAMA | Cz. Slania - mappa FO, DK + GL | * | 225,00 | 31,00 | | |
| **Útgáva 20.09.2021 - ILA/COVID-19 - FO 965-966 (smáark við 2 frímerkjum)** | | | | | | |
| PPS000921 | ILA / COVID-19, smáark óst. | * | 45,00 | 6,30 | | |
| FFT000921 | ILA / COVID-19, smáark st. | ☉ | 45,00 | 6,30 | | |
| DDT000921 | ILA / COVID-19, smáark dgst. | ☉ | 45,00 | 6,30 | | |
| FFU000921 | Fyrstadagsbjálvi v/smáarki | ☉ | 50,00 | 7,00 | | |
| **Útgáva 20.09.2021 - Ingálvur av Reyni - FO 967-968 (2 frímerki)** | | | | | | |
| PPA010921 | Ingálvur av Reyni, røð óst. | * | 56,00 | 7,80 | | |
| FFG010921 | Ingálvur av Reyni, røð fdst. | ☉ | 56,00 | 7,80 | | |
| DDG010921 | Ingálvur av Reyni, dgst. | ☉ | 56,00 | 7,80 | | |
| FFK010921 | Fyrstadagsbjálvi v/røð | ☉ | 61,00 | 8,50 | | |
| FFL010921 | Fyrstadagsbj. v/einkultmerkjum | ☉ | 63,00 | 8,80 | | |
| FFM010921 | Fyrstadagsbjálvi v/4-bl. | ☉ | 231,00 | 32,30 | | |
| PPB010921 | 4-bl, ovara marg. óst | * | 224,00 | 31,30 | | |
| PPC010921 | 4-bl, niðara marg. óst. | * | 224,00 | 31,30 | | |
| PPD000967 | Ingálvur av Reyni, ark 17KR (20) | * | 340,00 | 47,60 | | |
| PPD000968 | Ingálvur av Reyni, ark 39KR (20) | * | 780,00 | 109,20 | | |
| **Útgáva 20.09.2021 - Kirkjuklæði III: Biskupskápur - FO 969-970 (2 frímerki)** | | | | | | |
| PPA020921 | Biskupskápur, røð óst. | * | 44,00 | 6,15 | | |
| FFG020921 | Biskupskápur, røð fdst. | ☉ | 44,00 | 6,15 | | |
| DDG020921 | Biskupskápur, røð dgst. | ☉ | 44,00 | 6,15 | | |
| PPN000921 | Frímerkjahefti, óst. | * | 132,00 | 18,50 | | |
| FFO000921 | Frímerkjahefti, fdst. | ☉ | 132,00 | 18,50 | | |
| DDO000921 | Frímerkjahefti, dgst | ☉ | 132,00 | 18,50 | | |
| PPJ000921 | Postkort (2) | * | 14,00 | 2,00 | | |
| FFJ000921 | Maksimumkort (2) | ☉ | 58,00 | 8,10 | | |
| FFK020921 | Fyrstadagsbjálvi v/røð | ☉ | 49,00 | 6,90 | | |

* = óstemplað, ☉= stemplað

| Nr. | Vøra | | Prísur DKK | Prísur Euro | Nøgd | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| FFL020921 | Fyrstadagsbj. v/einkultmerkjum | ⊙ | 51,00 | 7,10 | | |
| FFM020921 | Fyrstadagsbjálvi v/4-bl. | ⊙ | 183,00 | 25,60 | | |
| FFP000921 | Fyrstadagsbjálvi v/hefti | ⊙ | 137,00 | 19,20 | | |
| PPB020921 | 4-bl, ovara marg. óst | * | 176,00 | 24,60 | | |
| PPC020921 | 4-bl, niðara marg. óst. | * | 176,00 | 24,60 | | |
| PPD000969 | Biskupskápur, ark 17KR (20) | * | 340,00 | 47,60 | | |
| PPD000970 | Biskupskápur, ark 27KR (20) | * | 540,00 | 75,60 | | |
| **Útgáva 01.10.2021 - Postgjaldsmerki 2021 - Søgusigarar** | | | | | | |
| PMA002021 | Postgjaldsmerki 2021, óst. | * | 68,00 | 9,50 | | |
| FMG002021 | Postgjaldsmerki 2021, fdst. | ⊙ | 68,00 | 9,50 | | |
| DMG002021 | Postgjaldsmerki 2021, dgst. | ⊙ | 68,00 | 9,50 | | |
| FMK002021 | Fyrstadagsbjálvi v/røð | ⊙ | 73,00 | 10,20 | | |
| FML002021 | Fyrstadagsbj. v/einkultmerkjum | ⊙ | 79,00 | 11,00 | | |
| **Ymiskt** | | | | | | |
| WPLANDREA | Plakat: Andrea Árting | | 150,00 | 21,00 | | |
| WFWORKS21 | Plakat: Floral Fireworks | | 150,00 | 21,00 | | |
| WALIEN021 | Plakat: Casual Alien | | 150,00 | 21,00 | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | ***Avgreiðslugjald:*** | **25,00** | **3,50** | **1** | **25,00** |
| | | | | **Prísur íalt:** | | |

Vinaliga fyllið út teigarnar aftanfyri! →

## Gevið gætur! Kunning um gjaldskort

Orsakað av nýggju altjóða trygdarásetingini, tí sonevndu "2-parta-góðkenningin", sum kom í gildi, tann 1. januar 2021, kunnu vit ikki handfara gjaldskort eins og áður.

Í staðin bjóða vit eina snilda og trygga loysn, har tú kanst rita inn á okkara heimasíðu og skráseta títt gjaldskort. Á hendan hátt kanst tú lætt og trygt gjalda fyri bæði tíni framtíðar hald eins og fyri eyka bíleggingar.

Tó ber væl til at bíleggja frímerki á www.stamps.fo og gjalda við gjaldskorti, uttan at kortið verður skrásett. Nýggjar útgávur eru vanliga tøkar at bíleggja 1 mánaða fyri útgávudagin.

Tú kanst eisini gjalda umvegis gjaldstænastuna PayPal - www.paypal.com, um tú ert tilmeldað/-ur hesa tænastu.

### Gjaldshættir

- ☐ Upphæddin verður flutt á konto nr. 9870 4271212 hjá Posta Stamps.
- ☐ Upphæddin skal skuldskrivast kundakonto míni.
- ☐ Upphæddin verður flutt umvegis **PayPal** til stamps@posta.fo. Hetta kostar 5,00 kr í ómaksgjaldi, sum vit biðja teg vinaliga leggja omaná upphæddina.

Vinarliga upplýs kundanummar, tá bílagt og goldið verður.

☐ **Ja, takk. Eg vil fegin fáa tíðindaskriv umvegis teldupost**


Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo


Navn: __________

Bústaður: __________

Postnr./býur: __________

Land: __________

T-postur: __________

Kundanummar: ☐☐☐☐☐☐☐

PS2021